Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020

Spurningar:

1. Hvussu nógvar umsóknir komu um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir og ískoytiskvotur í 2020?

2. Vórðu umsóknirnar viðgjørdar í umsitingini og tilmæli gjørd í Fiskimálaráðnum til landsstýrismannin um, hvørjar umsóknir luku treytirnar og eftir fakligari meting áttu at játtast sambært lóg og kunngerð?

3. Hví vórðu ongar játtanir givnar til umsóknir til vinnuligar kvotur og verkætlanir í 2020 – og við hvørjari heimild og skjalfestari grundgeving vórðu kvoturnar ikki játtaðar – meðan ískoytiskvotur kortini vórðu latnar?

4. Um umsóknir vórðu tilmældar frá umsitingini í Fiskimálaráðnum at játta, hvørjar vóru so tær ítøkiligu umsóknirnar, ið ikki vórðu játtaðar kortini?

5. Um svarið er játtandi til spurning 2 og 4, hvør er tann lógliga, sakliga, proporsjónala og líkaregluliga grundgevingin fyri ikki at játta – og hvør er sakliga grundgevingin fyri, at landsstýrismaðurin ístaðin leggur broyting í sjófeingislógini fyri tingið, ið broytir treytirnar fyri at søkja um hesar kvotur?

6. Eru umsóknir frá umsøkjarum, ið ikki vórðu tilmældar fakliga frá umsitingini í 2020, sum ístaðin hava fingið játtan í 2021 eftir broyttu treytunum?

Viðmerkingar:

10. juli 2020 lýsti Fiskimálaráðið eftir umsóknum til vinnuligar royndir og verkætlanir og til ískoytiskvotur. 10. August 2020 skuldu umsóknirnar vera latnar Fiskimálaráðnum.
Kvotur vórðu játtaðar til ískoytiskvotur. Men ongar kvotur vórðu játtaðar til vinnuligar royndir og verkætlanir. Seinni legði landsstýrismaðurin uppskot til lógarbroyting fyri tingið, ið broytti treytirnar fyri hesum kvotum, m.a. við at skoyta upp í játtan til ítøkiligt skipakeyp – sum í 2021 fór við mestu tøku tonsunum.
Tí verður spurt, hvat hendi her. Og hvussu skjalfestast kann, at hetta er lógligt, sakligt, proporsjónalt og í samsvari við líkaregluna í fyrisiting.

Á Løgtingi, 1. oktober 2021

Høgni Hoydal